# Fremja grønlendskan útflutning

Hvørjar útflutningsmøguleikar hava grønlendskar fyritøkur, og hvussu skulu grønlendsku fyritøkurnar bera seg at fyri at selja sínar vørur uttanlands? Teinum spurningunum ætla Grønlands Turist- og Erhvervsråd og danska útflutningsráðið sær at svara við einari røð av fyrilestrum, sum verða í Nuuk, Maniitsoq, Sisimiut og Ilulissat teir næstu mánaðirnar, sigur KNR. Aftan á hvønn fyrilestur fáa umboð fyri grønlendskar fyritøkur høvi til at fáa ráð og leiðbeining frá einum umboði hjá danska útflutningsráðnum og einum umboði fyri grønlendska vinnuráðið. Tann fyrsti fyrilesturin í røðini verður í Nuuk tann 23. í hesum mánaðinum.

# Spyrja um veðurlagið

Seinni í hesum mánaðinum fara nakrir danskir granskarar til Eysturgrønlands, har teir fara at spyrja veiðimenn og onnur, hvussu tey hava varnast avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum. Granskaraferðin er komin í lag í einum samstarvi millum donsku veðurstovuna DMI, Nordisk center for regionalforskning og Roskilde Universitets Center. Avtalað er, at grønlendingar verða umboðaðir í granskingini. Tey, sum skipa fyri ferðini og kanningunum, siga, at málið er at fáa staðfest, hvussu veðurlagsbroytingarnar ávirka tey samfelagsligu og tey sosialu viðurskiftini í lokalsamfeløgunum. Granskararnir skulu fyrst vitja Ittoqqortoormiut og síðani Tasiilaq.



*Skúlabyggingin í Nes kommunu, sum er ein íløga upp á stívliga 50 miljónir krónur tilsamans, nærkast nú endanum, og seinni í hesum mánaðinum er ætlanin, at út-og umbyggingin alment verður tikin í nýtslu*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Á heimasíðuni hjá Nes kommunu verður sagt, at talið av lærarum, sum hava sína dagligu gongd á skúlanum, er 23, og umframt lærararnar eru fýra pedagogiskir stuðlar knýttir at skúlanum.

Allar tær nýggju stovurnar eru nú tiknar í brúk, umframt at nýggja fimleikarhøllin og aulan eisini eru liðug.

- Køkurin og hondarbeiðsstovan eru ikki heilt liðug enn, men verða væntandi klár at taka í brúk innan stutta tíð, verður sagt á heimasíðuni hjá Nes kommunu.



*Súni í Hjøllum, varaborgarstjóri og formaður teknisku nevnd, var í fyrstu bygginevndini fyri út-og umbygging av Tofta skúla*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Vestmenningur og Fram vóru ein stuttan upsatúr herfyri, men nú eru teir aftur á gulllaksi*
*Mynd: Karstin Vang*

# Eingin keypari - meira sigling

**Arvid Petersen, sum er annar skiparin við Vestmenningi, sigur, at nú upsafiskiskapurin er heldur slakur í løtuni, gjørdu teir av at leggja um aftur til gulllaks og fara at selja veiðina uttanlands**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gulllaksafiskiskapurin hevur verið sera góður í ár og nú bæði virkini, sum hava keypt gulllaks, eru givin at taka ímóti, halda skip kortini fram við at fiska og selja veiðina uttanlands.

Teir, sum sigla við hesum skipum, siga, at tað hevur viðrað væl í summar, og somuleiðis hevur fiskiskapurin verið at tí allar besta.

Helst betri enn nakrantíð áður.

Herfyri gavst Tavan at keypa, tí virkið hevði fingið ta nøgd av gulllaksi, sum svarar til marknaðin, ið verður røktur gjøgnum alt árið.

Á Tavuni arbeiða tey gulllaksafars.

Tá leirvíkingar góvust við at virka fars, keypti Tavan nakað av fiski, sum varð avhøvdaður og frystur til útflutnings.

Í Vestmanna, har Atlantis eisini hevur keypt gulllaks í vertíðini í ár, eru teir fyribils givnir at keypa, tí nógvur fiskur hevur verið á goymslu.

Hóast virkini í Føroyum eru givin at keypa gulllaks, eru skipini kortini ikki givin við at fiska. Tey eru hildin fram við veiðini og hava landað uttanlands, eitt nú í Skotlandi og Íslandi.

Øll trý pørini, sum eru á gulllaksi í hesi vertíðini, hava landað onkra lastina uttanlands.

### Aftur á gulllaks

Herfyri løgdu partrolararnir Vestmenningur og Fram, sum hava verið á gulllaksaveiði í summar, um aftur til upsa, men henda royndin gjørdist stokkut.

Arvid Petersen, sum er annar skiparin við Vestmenningi, sigur, at nú upsafiskiskapurin er heldur slakur í løtunu, gjørdu teir av at leggja um aftur til gulllaks.

Vestmenningur og Fram eru í løtuni á gulllaksaveiði, og ætlanin er, at skipini skulu landa í Íslandi fyrsta dagin.

Tá vit frættu av Vestmenningi í gjárkvøldið, lótu teir væl at fiskiskapinum.

- Vit hava fingið nógv meira burtur úr gulllaksinum í hesi vertíðini enn vertíðini seinasta ár.

Arvid Petersen sigur, at nú teir noyðast av landinum við veiðini, tí eingin keypari er í Føroyum, verður meira sigling og mist tíð.

- Men, sum er hava vit hildið, at tað loysir seg líka væl – og helst betri – hjá okkum at vera á gulllaksi sum á upsa, nú upsafiskiskapurin ikki er nakað serligur í løtuni, sigur skiparin á Vestmenningi.



*- Tað er meira sigling, nú eingin keypari er til gulllaksin í Føroyum, sigur Arvid Petersen, skipari á Vestmenningi*
*Mynd: Karstin Vang*